Norrøn Heimavirkislega:

# Spitarin er í botni

**Hesa vikuna skipar Føroyskt Heimavirkisfelag fyri Norrønari Heimavirkislegu. Eini 80 fólk eru við á leguni í aldrinum 6 til 82 ár**

NORRØNT SAMSTARV
*Ingrid Bjarnastein*

Í eina heila viku skulu tey binda, skera træ, flætta bond, gera rotiskógvar, smíða, gera mat, lita plantur og virka til horn og bein.

Yvir 80 fólk eru við á Norrønu Heimavirkisleguni, sum Føroyskt Heimavirkisfelag skipar fyri hesa vikuna. Fólk eru komin úr øllum Norðanlondum uttan úr Íslandi, og hetta er triðja ferðin henda legan er í Føroyum. Skift verður ímillum tey ymsu londini at hava eina slíka legu hvørt summar.

– Familjur koma, menn, konur og børn. Eini 10 børn eru við í ár, og hava sleppa tey eisini at virka ymiskt til, sigur Torgerð Mørkøre, sum er ein av fyriskiparunum til leguna.

– Endamálið við leguni er at virka lutir til úr føroyskari rávøru. Tá legan er í onkrum øðrum landi, verða lutir virkaðir út rávøruni úr tí landinum.

## Arbeiða allan dagin

Tey, ið eru við á leguni, halda til uppi á skúlaheiminum í Marknagili og á Læraraskúlanum. Luttakararnir búgva allir á skúlaheiminum.

Byrjað verður longu klokkan 7.30 á morgni við morgunmati og morgunfimleiki. Klokkan 9.00 verður farið undir tey ymsu hondarbeiðini.

Hildið verður á heilt til klokkan 16.30, men siga fyrireikararnir, at tey flestu taka tað við sær, og halda so áfram at arbeiða við tí eisini um kvøldið.

Í kjallaranum á skúlaheiminum verða borðtennisborð brúkt sum vanlig borð, og rundan um eitt sita nakrir sviar og norðmenn og skera út træ. Longri yviri sita nakrar aðrar konur og flætta bond, og heilt yviri í endanum verða rotiskógvar seymaðir. Ein heilt serligur roykur kemur frá skónum, men allar konurnar sita so hugagóðar og seyma.

Í dag, mikudag, er ætlanin at fara undir Vestmannabjørgini – um viðrar væl at merkja. Um veðrið er vánaligt, verður farið til Eiðis. Mikudag hava luttakararnir altíð frí, og tá verður altíð skipað fyri eini útferð.

Legan endar fríggjadagin klokkan 17 við eini framsýning uppi á skúlaheiminum. Har kunnu øll, ið hava hug, fara niðan og síggja lutirnar, ið tey ymsu hava tilvirkað. Um kvøldið verður ein veitsla fyri luttakarunum.



.... og í hinum sita tey og seyma rotiskógvar.

*Mynd: Finnur Justinussen*



*Í einum enda í kjallaranum á skúlaheiminum í Havn sita tey og skera út í træ.......*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Vit skriva víðari

Seinna arbeiðshefti til lesibókina hjá fyrsta flokki er nú givið út, og er tað Føroya Skúlabókagrunnur, sum stendur fyri útgávuni.

Hjørdis Heindriksdóttir hevur skrivað, meðan Olivur við Neyst hevur myndprýtt bókina. Vit skriva 2 er framhald av fyrra arbeiðsheftinum, og fylgja hesi bæði heftini við lesibókini.

Við ymsum venjingum verður roynt at festa útsjóndina á bókstavunum og ljóð teirra í minnið hjá børnunum. Uppgávurnar eru til at venja næmingarnar við at skriva bókstavirnar, og styrkja lesiinnlæringina.

Gramar hevur staðið fyri tí grafiska arbeiðinum, meðan Dimmalætting hevur prentað. Vit skriva 2 er 38 blaðsíður og fæst í bókabúðunum kring landið fyri 48 krónur.

-ib




*Vit skriva 2 er júst komið út í bókabúðirnar*




Brandt
Blomberg

Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
* Glas keramikk plátur
* Yvir- og undirvarma
* Heita luft

prísur fyrr 7.995,-
Nú 6.995,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



Brandt
Blomberg

Hvítvørur til føroyska húsarhaldið

6 kg turr klæðir

600-1600 snúningar




prísur fyrr 6.295,-
Nú 5.595,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




# Meðan vit bíða

**Pílurin vísur, hvønn veg tú skal koyra, um tú ynskir at sleppa úr Klaksvík til Leirvík. Men enn førir vegurin einans út á sjógv**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Tað er eingin loyna, at klaksvíkingar gleða seg óføra nógv, til undirsjóvartunnilin endilig gerst veruleiki. Hóast bíðitíðin kann tykjast long, so eru fyrstu stigini nú tikin til fasta sambandið, sum skal gera gerandisdegin lættari hja teim flestu.

Á vegnum við Borðoyarvík út til bátahylin er ein pílur málaður á vegin. Undir pílinum stendur Leirvík skrivað, og eisini kilometurtalið, sum skal koyrast, um tú einaferð fert gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Alt ein ábending um, at tunnilin vónandi gerst veruleiki um ikki alt ov langa tíð.




*Ætlar tú tær til Leirvík, so er bert at fylgja hesum pílinum. Tó mást tú bíða nøkur ár, áðrenn veruleiki spyrst úr hesum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Fleiri almenn w.c í Klaksvík

**Undir skýlinum hjá KÍ finnast nú trý nýggj almenn w.c. til ferðafólk og onnur at nýta**

ALMENN W.C.
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ferðafólk ymsastaðni frá hava ofta klagað um, at eingi w.c. eru at finna í Klaksvík til teirra at nýta. Serliga hevur hetta verið ein trupulleiki hjá teimum, ið bert vitja býin á einum heildagstúri ella minni.

Tvey onnur almenn w.c. hava verið í býnum gjøgnum eina tíð, men hesi hava verið í so vánaligum standi, at eingin hevur tímað at gjørt nýtslu av teimum.

Tey eru nú gjørd í stand av nýggjum, samstundis sum trý nýggj w.c. eru gjørd í skýlinum við vølllin í Klaksvík.

Tað er Klaksvíkar Kommuna, sum hevur gjørt hesi nýggju w.c.ini, og hevur kommunan eisini ábyrdina av teimum. Ein umsjónarmaður er settur at hava eftirlit við teimum, og er tað hesin maður, sum letur w.c.ini upp um morgunin, og læsir dyrnar, tá náttin nærkast.

- Vit hava valt ikki at hava w.c.ini opin um náttina. Hetta fyri at sleppa undan, at herverk verið gjørt, siga tey frá kommununi.

Í skýlinum finst eitt w.c. fyri mannfólk, eitt fyri konufólk og eisini eitt fyri tey, ið bera brek av einum ella øðrum slagi.

Eisini eru ætlanir um at gera enn fleiri umvælingar við tað w.c.ið, sum finst á Biskupstøð.

Millum annað skal ein rampi gerast á tí ovari síðuni, so at w.c fær sína egnu inngongd, og ikki sum nú hevur somu inngongd, sum handilin hjá Heimavirkinum.

Hesin rampi gevur so eisini fólki í koyristóli møguleika at gera nýtslu av w.c.inum.

Almennu w.c.ini hjá Klaksvíkar Kommunu eru opin hvønn dag gjøgnum alla summarhálvuna.



*Klaksvíkar Kommuna hevur ábyrgdina av teimum nýggju w.c.unum undir skýlinum*

# Rindaði brúðarskógvar við 25 oyrum

**Nógvar fyrireikingar eru til eitt brúdleyp. Nógv skal keypast og millum annað skal brúðurin hava skógvar**

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Mánadagin var ein ung kvinna inni í skóhandlinum hjá Elsu Krosstein í Klaksvík og keypti sær brúðarskógvar. Hon og komandi maðurin hjá henni skulu giftast 3. august, so tað er, sum so, ikki nakað óvanligt í, at henni tørvaði einar brúðarskógvar.

Men tað, sum kortini ger tað eitt sindur óvanligt er, at hon rindaði skógvarnar við 25 oyrum.

- Eg havi samlað síðani 4. august í fjør. Dagin eftir at hann spurdi meg, greiðir kvinnan frá.

Hon samlaði bæði 25 og 50 oyru til at keypa skógvarnar fyri, men hon fekk so einans brúk fyri 25 oyrunum at rinda skógvarnar við.

Marita Krosstein, sum arbeiðir í skóhandlinum hjá Elsu, sigur, at hetta er triðju ferð, sum hon veit av, at ein kvinna keypir brúðarskógvar við 25 oyrum. Men hetta var aðru ferð innan heilt stutta tíð.



*Marita Krosstein gevur her Svannu Jacobsen brúðarskógvarnar, sum hon rindaði við 25 oyrum*

*Mynd: Finnur Justinussen*


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0 GX**
gráur, 5 hurðar,
árg. 1999, 27.000 km.
**85.000**

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
**88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 110.000 km.
**110.000**

**Nissan Almera 1,6**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1996, 66.000 km.
**75.000**

Sosialurin

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
**110.000**

**Nissan Sunny 1,6 LX**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1987.
**15.000**

**Nissan Primera 1,6 Player**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
**65.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Opel Corsa 1,2**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1996, 40.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1990, 255.000 km.
**26.000**

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
**130.000**

**Subaru 1600**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1989, 140.000 km.
**10.000**

**Saab 900 2,0i**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1996, 129.000 km.
**110.000**

**Fiat Tipo**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1990, 196.000 km.
**10.000**

**Honda Civic 1,4is**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1998, 101.000 km.
**99.000**

**Subaru Legacy 1,8 GL**
beige, 4 hurðar,
árg. 1991, 120.000 km.
**30.000**

**Volvo S40 1,8**
reyður, 4 hurðar,
árg. 2002, 12.000 km.
**250.000**

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61